

# SANGMØTI VIÐ HARMONIKUVINUM

Sunnukvøldið 5. mai kl. 18.00 fáa vit vitjan av harmonikuvinum, og hetta møti verður eitt sangmøti burturav. Harmonikuvinir eru vornir kendir, og hava teir ferðast víða í landinum og luttikið bæði í kirkjum og samkomuhølum. Tað er jú tiltikið, at føroyingar elska at syngja, og hetta ger seg eisini galdandi innan samkomulívið í Føroyum, og felagssangurin, sum harmonikuvinir standa fyri, samlar rættuliga nógv fólk.

Vit gleða okkum til eitt øðrvísi møti, og vilja bjóða øllum hjartaliga vælkomnum til eitt sangmøti, har felagssangur er í hæddini, men har eisini rúm er fyri sangframførslu.

## *Familjudøgurði 23. mai kl. 17.30*

Tað hevur verið ein sonn frøi at síggja, hvussu fólk hava hugnað sær, tey kvøldini vit hava havt familjudøgurða. Hetta varð lýst sum eitt tiltak, har familjur við børnum komu tættari at hvør øðrum, tí vanliga sæst man bert á møtinum sunnudag, og tað førir ikki til so nógvan persónligan felagsskap. Og serliga við atliti til okkara yngra ættarlið, so hevur tað stóran týdning, at vit fáa tættar relatiónir, og koma at kenna hvønn annan væl og virðiliga. Síðsti familjudøgurðin fyri summarsteðgin verður 23. mai, og hóast summartíðin nærkast, so vóna vit, at undirtøkan verður líka stór, sum hon hevur verið. Eitt, sum tó hevur verið nakað trekt, tað er tilmeldingin – fólk gloyma at melda til, og hetta er jú neyðugt, so vitast kann hvussu nógvur matur skal fyrireikast. So takið ímóti hesi vinarligu áheitan: Minnist til at tekna tykkum til familjudøgurðan á tlf. 284821. tj



MAI 2019

# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*

## SERA VÆLEYDNAÐ FELAGSKIRKJULIG GUDSTÆNASTA Í FILADELFIA




Týskvøldið 3. páskadag var okkara árliga felagskirkjuliga gudtænasta hildin í Filadelfia, og sigast má, at gudstænastan var einastandandi í dygd, atmosferu og felagsskapi. Umboð frá øllum kirkjum og samkomum luttóku á ein ella annan hátt, og líka frá byrjan kendist ein sera jalig atmosfera, og samstundis merktist eitt satt frælsi at vera yvir gudstænastuni.

Gudstænastan byrjaði við at hornorkestrið úr Frelsunarherinum spældi, og síðani bjóðaði presturin í Adventistakirkjuni Allan Falk vælkomin.

Hesar gudstænasturnar hava nú koyrt í fleiri ár, og tað er ein sannroynd, at felagsskapurin og samfelagið millum tær ymisku samkomurnar gerst bara betur og betur. Tað vóru umleið 150 fólk samankomin, og gleðin og væntanin millum manna var eyðsýnd.

Eftir gudstænastuna var kaffi og køkur á skránni, og fólk prátaðu og hugnaðu sær, og tað var sjónlig vælnøgd, nú gudstænastan var lokin.

KVF var til staðar við sjónvarpstólum, og væntandi verður gudstænastan send á hvítusunnu. Lindin sendi beinleiðis, og tað er ein avbera góð siðvenja, at Lindin og KVF eru við at varpa gudstænastuna – tøkk fái tey fyri teirra vælvild.

Persónliga kendist tað deiligt, at vit í Filadelfia fingu loyvi til at seta eitt fingramerki á, við at hava „góð tíðindir“ í skránni, og eg má siga, at okkara umboð, Eyðgerð Nattestad, sum bar fram góð tíðindir, rørdi djúpt við hvørja sál, sum var tilstaðar.

Tað verður í løtuni arbeitt við einum heilt øðrvísi felagstiltaki millum somu kirkjur og samkomur. Hetta verður í summar, og kemur at verða í miðbýnum í Havn; men tað frætta vit meira um seinni.

*tj*

# MAI 2019

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudagur | 1. | Kl. 17.30 | **EPIC** |
| | | Kl. 20.00 | **Sisters House** |
| Leygardagur | 4. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| Sunnudagur | 5. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 12.00 | **Simca** |
| | | | Møtivertar: Áshild, Merli og Hildibrandur |
| | | | Leiðari: Marner |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Sólrún |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Tummas J. |
| | | | Forbønartoymi: Bólkur 2 |
| | | | Kaffitørn: Áshild, Merli og Hildibrandur |
| | | Kl. 18.00 | **Sangmøti v. harmonikuvinum** |
| Mánadagur | 6. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Regin |
| Mikudagur | 8. | Kl. 17.30 | **EPIC** |
| | | Kl. 20.00 | **Sisters House** |
| Leygardagur | 11. | Kl. 11.00 | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 12. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** (mammudagur) |
| | | Kl. 12.00 | **Simca** |
| | | | Møtivertar: Gerd, David og Hans |
| | | | Leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Lillian, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Eyðfríð |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Dávid |
| | | | Talari: Pól Bungay |
| | | | Forbønartoymi: Bólkur 3 |
| | | | Kaffitørn: Gerd, David og Hans |
| Mánadagur | 13. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Sam |
| Mikudagur | 15. | Kl. 17.30 | **EPIC** |
| | | Kl. 20.00 | **Sisters House** |
| Leygardagur | 18. | | **Reingerð:** Sisters House |
| Sunnudagur | 19. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner og Dánjal |
| | | | Leiðari: Sam |
| | | | Lovsongsleiðari: Jacobina, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Frá Salt & Light |
| | | | Forbønartoymi: Bólkur 4 |
| | | | Kaffitørn: No-omi, Marner og Dánjal |
| Mánadagur | 20. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Anna |
| Mikudagur | 22. | Kl. 17.30 | **EPIC** |
| | | Kl. 20.00 | **Sisters House** |
| Hósdagur | 23. | Kl. 17.30 | **Familjudøgurði** |
| Leygardagur | 25. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 26. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 12.00 | **Simca** |
| | | | Møtivertar: Maibritt, Anton Petur og Gloria |
| | | | Leiðari: Conny |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Aron |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Mariann |
| | | | Forbønartoymi: Bólkur 1 |
| | | | Kaffitørn: Maibritt, Anton Petur og Gloria |
| Mánadagur | 27. | Kl. 20.00 | **Lovsongur og forbøn** |
| Mikudagur | 29. | Kl. 17.30 | **EPIC** |
| | | Kl. 20.00 | **Sisters House** |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## *Salt & Light dagur í Filadelfia*

Leygardagin 18. mai verður Salt & Light dagur í Filadelfia. Hetta er ein dagur fyri leiðarar, men øll eru vælkomin, tí hóast ein ikki stendur í leiðarastarvi í samkomuni, so leiða vit øll, har vit eru. Salt & Light er ein relatiónsfelagsskapur, har størsti denturverður lagdur á at hava felagsskap frá hjarta til hjarta. Talan er ikki um eitt netverk, men um relatiónir. Vit hava havt slíkar Salt & Ligth dagar áður, og seinast hetta varð hildið í Filadelfia, talaði David Hudson tann fylgjandi sunnudagin. Eg minnist sera væl boðskapin um tær 4 áirnar, sum eru umtalaðar í 1. Mós. kap. 2.

Ein kendur persónur, sum plagar at viðvirka er Lena Løbner, sum væntandi eisini verður við hesa ferð. Høvuðskontaktpersónurin til Salt & Light í Føroyum er Rói Norðoy, og samkoma hansara „Karis" er partur av Salt & Light.

Byrjað verður kl. 10.00 leygardagin og hildið verður fram til umleið kl. 16.00 við einum døgurðasteðgi á umleið 1 tíma. Sunnudagin 19. mai talar onkur frá Salt & Ligth felagsskapinum; enn er ikki avgjørt hvør, men tað frætta vit meira um seinni.

Verið hjartaliga vælkomin til Salt & Light dag og eisini hjartaliga vælkomin til møti sunnudagin 19. mai kl. 11.00. *tj*